**Advokatfelagið** við Strond 4

JÓGVAN P. LASSEN
PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN
ANNA DAM
INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN
JULIANNA KLETT

J.nr. 731702

# Viðtøkur

Navn, heimstaður og endamál

**1. grein**

Navn felagsins er partafelagið P/F Lív lívs- og pensiónstryggingarfelag.

Heimstaður felagsins er Kopargøta 1 í Tórshavnar kommunu.

Endamál felagsins er sambært lóg at umsita tryggingarnar, sum vórðu teknaðar í Føroya Lívstrygging fyri 1. januar 2000, tá Føroya Lívstrygging, varð umskipað í partafelag, og rekur felagið sítt virksemi eftir ásetingunum í løgtingslóg nr. 53 frá 12. mai 2015 um P/F Lív lívs- og pensiónstryggingarfelag

Felagið er sostatt eitt felag undir avtøku, sum avviklar og rekur ta yvirtiknu tryggingarmongdina yvir eitt avtalað tíðarskeið, íroknað hækkingar og aðrar broytingar í samsvari við gjørdar avtalur við hvønn einstakan tryggingartakara. Felagið kann ikki tekna nýggjar lívs- og eftirlønartryggingar, ella hava annað virksemi.

Felagið skal hava ein lutfalsliga langan íløgusjónarring og skal hava eina burðardygga íløguætlan við tí endamáli at tryggja eitt so stórt og virðisfast avkast sum gjørligt, við neyðugum atliti at váða, konsolidering, umsetligheit umframt etikki og umhvørvi. Í hesum sambandi skal ognin setast soleiðis at avkast og váði eru í einum rímuligum lutfalli.

Partapeningurin

**2. grein**

Partapeningur felagsins er kr. 16.428.254,-.

Partarnir eru kr. 1,- til støddar ella multipli av hesum.

Eingi partabrøv hava framíhjárættindi og eru ikki negotiabul.

Partabrøvini skulu ljóða uppá navn og skulu skrivast í yvirlit felagsins yvir partaeigarar.

Partaeigararnir hava onga skyldu til at lata partabrøv síni innloysa.

Hvør avhending av partabrøvum skal skilast til í bókum partafelagsins.
Partabrøv verða ikki útskrivað, uttan so, at onkur partaeigari biður um tað.

**3. grein**

Partabrøvini í felagnum kunnu ikki verða seld, uttan við loyvi frá Føroya Landsstýri. Somuleiðis er gjørd avtala um, at Føroya Landsstýri – so leingi landskassaveðhald er fyri tryggingarnar teknaðar hjá felagnum - kann yvirtaka atkvøðurættin á aðalfundi hjá felagnum.

Aðalfundurin

**4. grein**

Aðalfundurin verður skipaður av partaeigarum, ið hava eina atkvøðu fyri hvønn part uppá kr. 1,00. Partarnir skulu vera innskrivaðir í partabrævabók/partaeigarayvirlit felagsins, áðrenn aðalfundurin verður hildin, fyri at geva atkvøðurætt.

**5. grein**

Nevndin boðar til aðalfund á heimstaði felagsins við tilskilan av tíð, stað og dagsskrá í minsta lagi 14 dagar og í mesta lagi 4 vikur frammanundan aðalfundin, hetta við skrivliga at venda sær til hvønn einstakan partaeigara á tí bústaði, ið seinast er skrivaður í partabrævabókina/partaeigarayvirlitið ella við lýsing í almennum føroyskum lýsingarblaði.
Fráboðan um aðalfund skal eisini innihalda yvirlit yvir uppskot, sum eru komin inn, og í sambandi við eykaaðalfund, eisini orsøkina til, at fundurin verður hildin.

**6. grein**

Vanligur ársaðalfundur verður hildin á hvørjum ári í mars/apríl mánað til at viðgera.

1. Frásøgn nevndarinnar um virki felagsins í farna roknskaparári.
2. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar og hvussu møguligt avlop ella tap, sambært roknskapinum verður nýtt.
3. Val av nevnd – sí 15. grein.
4. Val av grannskoðara, ið situr til næsti vanligi ársaðalfundur er lokin.

Grannskoðarin skal vera løggildur grannskoðari.

5. Møguligt uppskot, ið nevndin ella partaeigararnir ynskja at viðgera.

**7. grein**

Allir partaeigarar hava heimild til skrivliga at bera fram uppskot til viðgerðar á aðalfundinum; hesi uppskot skulu setast á dagsskrá til tann fyrsta aðalfundin, sum hildin verður í mesta lagi 4 vikur aftaná, at uppskotið er latið inn.

Eykaaðalfundur

**8. grein**

Eykaaðalfundur verður lýstur, tá ið nevndin, ein aðalfundur ella grannskoðari vil, ella tá ið partaeigarar, ið tilsamans eiga 1/20 av partapeninginum, skrivliga krevja tað til at viðgera evni, ið samstundis verður tilskilað. Eisini kann Føroya Landsstýri krevja aðalfund í felagnum.

Fundarrættur og orðstýrari

**9. grein**

Atgongd til aðalfundin hava partaeigarar, ið eftir partabrævabókini/yvirlitinum við partabrævi, ið er innskrivað í bókina/yvirlitið, kunnu prógva, at teir eru partaeigarar. Partaeigari kann skrivliga geva øðrum partaeigara fulltrú til at fara á fund og greiða atkvøðu hansara vegna. Føroya Landsstýri hevur rætt til at møta á aðalfundi og har taka orðið.

**10. grein**

Aðalfundurin velur eftir uppskoti frá nevndini ein orðstýrara.

Atkvøðugreiðsla

**11. grein**

Á aðalfundinum verða øll mál at gera av við vanligum atkvøðumeiriluta.

Til at samtykkja viðtøkur, ið miða ímóti broytingum av viðtøkunum ella avtøka av felagnum, krevst tó, at í minsta lagi 2/3 av partapeninginum er umboðaður, og má viðtøka verða samtykt við 2/3 av teimum møttu atkvøðunum, umframt 2/3 av tí á aðalfundi umboðaða partapeningi við atkvøðurætti.
Er hesin partapeningur ikki umboðaður, verður boðað til nýggjan aðalfund og kunngjørt, sum í gr. 5 avgjørt, og á hesum fundi kann tá nevnda viðtøka við gildi samtykkjast við 2/3 av teimum møttu atkvøðunum, sama hvussu nógvir partaeigarar eru á fundi.

**12. grein**

Tá ið nýggjur aðalfundur verður hildin samsvarandi 3. stk. í 11. grein, hava fulltrúir frá tí fyrra aðalfundinum gildi, eisini á hesum seinra aðalfundinum, uttan so, at tær skrivliga eru afturkallaðar fyri felagnum í seinasta lagi 4 dagar frammanundan tí seinra fundinum, ella partabrøvini ímeðan eru seld.
Tað, sum verður havt til umrøðu á aðalfundinum, verður ført í eina fundarbók, sum verður undirskrivað av orðstýraranum.

**13. grein**

Øll atkvøðugreiðsla fer fram skrivliga, uttan so, at fundurin velur annan atkvøðugreiðsluhátt.

**14. grein**

Allar broytingar í viðtøkum felagsins ella avtøku av felagnum skulu, so leingi veðhald frá Føroya Landsstýri verður veitt felagnum fyri teknaðar tryggingar, góðkennast av Føroya Landsstýri.

Nevndin

**15. grein**

Í nevndina verða valdir 3-5 limir, sum Føroya Landsstýri tilnevnir.
Nevndin skipar seg við formanni og næstformanni.
Nevndin setur ein ella fleiri stjórar.

### 16. grein

Nevndin hevur fund so ofta formaðurin heldur tað vera neyðugt ella um ein av hinum limunum ynskir tað.
Eingin avgerð kann verða tikin á nevndarfundi, uttan so, at í minsta lagi 2/3 av nevndarlimunum eru á fundi.
Um atkvøðurnar standa á jøvnum, ræður formansins atkvøða.

### 17. grein

So leingi Føroya Landsstýri veðheldur fyri tryggingunum, teknaðar hjá felagnum, hevur nevndin skyldu til:

1. Eftir áheitan at lata Landsstýrinum allar upplýsingar um felagsins virki, uttan so, at hetta er brot á ófrávíkiliga lóggávu.
2. Beinanvegin at kunna Landsstýrið um viðurskiftir hjá felagnum, sum kunnu hava avgerandi fíggjarliga ella politiska ávirkan á felagið ella viðurskiftir, ella um viðurskiftir sum víkja frá áður givnum frágreiðingum ella ætlanum.
3- Hvønn ársfjórðing at lata Føroya landsstýri uppgerð av landskassaveðhaldinum.
4. Hvønn ársfjórðing at lata Føroya landsstýri frágreiðing um úrslitið av verandi íløguvirksemi í mun til tann av Føroya landsstýri góðkenda íløgupolitikk og váðaprofil.

### 18. grein

Íløgupolitikkur og váðaprofilur felagsins skal, so leingi landskassaveðhald er fyri tryggingar felagsins, verða góðkendur av Føroya landsstýri.

Tann av Føroya landsstýri til eina og hvørja tíð góðkendi íløgupolitikkur og váðaprofilur skal vera ásettur í fykgiskjali 1.

**19. grein**

Nevndin og stjórin saman reka felagið. Nevndin skal ansa eftir at felagið er væl skipað og rikið samsvarandi ásetingunum í løgtingslóg um P/F Lív lívs- og pensjónstryggingarfelag og vinnufelagslógini.

Nevndin skal við støði í góðkenda íløgupolitikkinum og váðaprofilinum fyri felagið geva stjóranum skrivligar leiðreglur, sum í minsta lagi skulu fevna um:

1) karmar, sum kunnu eftirkannast, fyri hvønn og hvussu stóra váða, stjórnin kann leggja á tryggingarfelagið,
2) meginreglurnar fyri uppgerð av einstøku váðasløgunum,
3) reglur fyri, hvørjar avgerðir krevja støðutakan nevndarinnar, og hvørjar avgerðir stjórnin kann taka sum part av starvi sínum, og
4) reglur fyri, hvussu og í hvønn mun stjórnin skal boða nevndini frá váðum tryggingarfelagsins, undir hesum eisini um nýtsluna av kørmunum í leiðreglunum fyri stjórnina og um at lúka tey mørk, sum eru ásett í lóggávuni viðvíkjandi teimum váðum, sum felagið kann átaka sær.

**20. grein**

Felagið verður bundið av stjóranum saman við einum valdum nevndarlimi ella av tveimum valdum nevndarlimum.

Fundarumrøður og viðtøkur verða skrivaðar í bók, sum verður undirskrivað av øllum á fundi.

Nevndin hevur heimild at geva fulltrúarumboð.

Grannskoðari

**21. grein**

Á hvørjum vanligum aðalfundi verður valdur ein løggildur grannskoðari.

**22. grein**

Roknskapurin skal áðrenn februar mánaði er farin, verða latin frá nevndini til grannskoðanina.

**23. grein**

Roknskaparárið er kalendaraárið.

**24. grein**

Við ársuppgerð skulu verða gjørdar - eftir nevndarinnar ætli - neyðturviligar avskrivingar og niðurskrivingar og úrslitið flutt til næsta ár, uttan møguleika fyri vinningsbýti ella aðra útlutan, hetta so leingi landskassaveðhaldið er galdandi.

Soleiðis samtykt á aðalfundi 20.04.2017

**Nevndin**

**Skjal 1**

**Íløgupolitikkur**

Felagið hevur við íløgupolitikki sínum sum aðalmál at tryggja eitt so gott og trygt avkast undir einum givnum váða, sum tekur hædd fyri konsolidering, umsetligheit, etikki og umhvørvi.

Í sambandi við íløgupolitikkin er eitt av málunum at virðini skulu verða umsetlig í mun til væntað útgjald til tryggingartakarar.

**Íløgukarmar (Váðaprofilur)**

Langsiktaða býti av íløgunum verður skift millum hesar íløgubólkar:

| Íløgubólkar: | Langsiktað: | Væntað í 2015: |
|---|---|---|
| Stats –og realkreditlánsbrøv | umleið 40-55% | 52% |
| Onnur lánsbrøv | umleið 15-25% | 20% |
| Partabrøv | umleið 25-35% | 25% |
| Kontant | umleið 0-3% | 3% |

Váðin fyri samlaðu íløgumongdina hjá felagnum (her máta sum standard frávik) eigur ikki at vera hægri enn 6%.